

# Leys størv

### Starvsfólk til asfaltarbeiði

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til asfaltarbeiði og annað fyrifallandi viðlíkahaldsarbeiði hjá Tórshavnar Kommunu.

Kunnleiki til entreprenørmaskinur og stórt koyrikort er ein fyrimunur, men eingin treyt.

Størvini eru tímalønt fulltíðarstørv.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. januar 2007. Merkið umsóknina „asfaltarbeiði".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Snarskivuna, tlf. 302010.

### Reingerðarfólk til Býlingshúsið Inni á Gøtu

Søkt verður eftir einum reingerðarfólki at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, 188 Hoyvík, í hendi seinasta lagi mánadagin 14. januar 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Poulu Ejdesgaard, stovnsleiðara, tlf. 317701.

### Pedagogur til Stella Maris vøggustovuna

Søkt verður eftir einum pedagogi, fyri pedagog í barsilsfarloyvi, at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 29. januar 2007 ella eftir nærri avtalu.

Starvstíðin er fram til 31. juni 2007.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsóknir saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Stella Maris vøggustovu, Varðagøta 11, 100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi leygardagin 20. januar 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Kristinu Eldevig, tlf. 312853 / 212853.

### Pedagogur til Býlingshúsið á Flat

Søkt verður eftir einum pedagogi, fyri pedagog í barsilsfarloyvi, at arbeiða 25 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2007. Starvstíðin er frá 1. mars 2007 til 29. februar 2008.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og KAF.

Umsókn saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsvegur 11, 188 Hoyvík í hendi í seinasta lagi mánadagin 22. januar 2007.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jensu Højgaard Andreassen, stovnsleiðara, tlf. 318371.

### Arbeiðsformaður í Nólsoy

Søkt verður eftir arbeiðsformanni til anleggsdeildirnar hjá teknisku deild at byrja skjótast gjørligt. Talan er um deildirnar, sum umsita vanligt viðlíkahaldsarbeiði innan veg- og kloakk, vatn&gøtuljós, frílendi og havnaøkið.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunun, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 26. januar 2007. Merkið umsóknina „arbeiðsformaður í Nólsoy".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

### Arbeiðsformaður til kloakk- og vedeildina í Kollafirði

Søkt verður eftir arbeiðsformanni til kloakk- og vegdeildina hjá Tórshavnar Kommunu, at byrja skjótast gjørligt.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunun, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 26. januar 2007. Merkið umsóknina „arbeiðsformaður í Kollafirði".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, deildarleiðara, tlf. 302010.

### Arbeiðsmaður ella handverkari til lendisdeildina [endurlýsing]

Søkt verður eftir fólki til urtagarðsarbeiði. Hetta er í høvuðsheitum lúking, grassláttur, planting og moldarbeiði. Tó kunnu uppgávur av sera ymiskum slag koma fyri.

Starvið er tímalønt fulltíðarstarv.

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 29. januar 2007. Merkið umsóknina „starv í lendisdeildini".

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Jógvan Olsen, røktarleiðara, tlf. 302010 ella 273680.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**


## Endurstovnan av felagnum Gjóvmanni

Verður í Miðlahúsinum
týskvøldið 9. januar kl 19.30

Vegna fyrireikarnar

Hans Andrias Djurhuus og Sofus Johannesen

## KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 10. januar 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

Hugo Kristiansen 225225
Jari Lykke 503002
Mikkjal Hansen 722578




**Eysturoyar Teoriskúli**

## Skúlaungdómur

Søkt verður eftir røskum skúlaungdómi til pakkiarbeiði seinnapartar.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja á tlf. 31 21 61 millum kl. 8:30 og 15:30.

Grón

**Hoyvíksvegur 65**
**Postboks 1048**
**110 Tórshavn**